Randi M. Gunnarsdóttir:

# Málningaframsýning á Hafnia

Framsýningin hjá Randi M. Gunnarsdóttir í Lobby-ini á Hotel Hafnia hongur uppi til og við leygardagin 1. juli.

Talan er um eina málningar, har myndaevnið er Føroyar.

Randi M. Gunnarsdóttir starvast sum stuðulspedagogur og undirvísir í kvøldskúlanum í máling og list.



*Randi M. Gunnarsdóttir hevur eina málningaframsýning á Hotel Hafnia til og við 1. juli*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Andlát og jarðarferðir

**Diana Hansen, Klaksvík**, andaðist týsdagin, 80 ára gomul. Kistan fer úr Kapellinum á Klaksvíkarsjúkrahúsi fríggjakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Betesta leygardagin kl. 13.30. Tey, ið vilja minnast Dianu, kunnu lata eina peningagávu til Zarepta; konta í peningastovninum.

**Henning Joensen**, ættaður úr **Vági**, búsitandi í **Miðvági**, andaðist týsdagin 27. juni 65 ára gamal. Kistan fer frá Ellisheiminum fríggjakvøldið kl. 18. heim í kirkjuna. Jarðarferðin verður úr Miðvágs kirkju leygardagin 1. juli kl. 13.

# Holy Riders komnir til Føroya

**Mikudagin 28. juni komu Holy Riders við Norrønu, og skipað varð fyri almennari móttøku í gamla Kommunuskúlagarði, har Heðin Mortensen, borgarstjóri, beyð teimum vælkomnum. Eisini var sangur á skránni**

MC

Fríggjadagin og leygardagin verður á fyrsta sinni hildin ein kristilig motorsúkklustevna, kallað "Atlantic Bike Meet", í Føroyum. Tað er felagið Holy Riders MC Føroyar, sum í hesum sambandi fær vitjan úr Norra og Týsklandi.

Umframt útlendingarnar, verður eisini luttøka av øllum teimum lokalu MC-feløgunum í Føroyum, og einstaklingar. Stevnan verður sett fríggjadagin 30. juni og heldur fram leygardagin 1. juli. Í samband við stevnuna, verða eisini evangeliskir fundir hildnir.

Hóskvøldið kl. 20 talar týskarin Kornelius Novak í Oasuni, Hoyvík, og sunnudagin verða møtir í "Kelduni" og í "Evangeliihúsinum" í Havn. Viðrar, verður útifundur í miðbýnum í Havn kl. 21.

Leygarkvøldið 1. juli, verður skipað fyri stórari almennari gospelkonsert í Kelduni kl. 20, har bólkarnir Vanja, Laila & Barbara, Sofus Hansen, Magni Christiansen og Eyðun Jacobsen Band luttaka.




*Holy Riders vitja í Miðlahúsinum, f.v. Victor Carlsen frá Holy Riders í Føroyum, Ole Kristian Kjenes úr Norra, og Kornelius Novak, vanliga nevndur Mondo, ið er forseti fyri týsku deildina hjá Holy Riders*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at elskaða kona, mamma, omma og langomma

**Diana Hansen**
Klaksvík

fór heim til Harran týsdagin 27. juni, 80 ára gomul.

Kistan fer frá kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, fríggjakvøldið kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Betesda leygardagin kl. 13.30.

*Familjunnar vegna*
**Esmar, Anna, Malena, Óla Jákup og Jógvan Kári**

*Tey, ið vilja minnast Dianu kunnu lata eina peningagávu til Zarepta.*

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara elskaði

**Henning Olaf Joensen**

f. 17. januar 1941 í Vági
búsitandi í Miðvági

andaðist týskvøldið 27. juni á Ellis- og Røktarheiminum í Vágum.

Kistan fer frá Ellisheiminum fríggjakvøldið kl. 18.00 heim í kirkjuna.
Jarðarferðin verður úr Miðvágs kirkju leygardagin 1. juli kl. 13.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Thorborg**

Tey, ið vilja minnast Henning, kunnu lata eina peningagávu til Miðvágs kirkju.

**Dagurin í morgin**

**30. juni. Lucina**, deyð umleið ár 100. Kristin kona, sum sigst at hava verið upplærd av ápostlunum sjálvum. Annars er dagurin eisini ein av pálsmessunum.

Les Sosialin so ert tú við